Nakrar viðmerkingar

til harra e í SOSIALINUM 2.8.

Viðvíkjandi framamonnum sum leigusveinar Sovjetimperialista, er hartil at siga, at sjálvandi verða teir ikki løntir av imperialistunum, ei heldur vita teir av tí sjálvir, men eitt stendur fast, ein og hvør militantur minniluti, ið við harðskapi vil renna galdandi stýrisskipan um koll (í hesum førinum demokratiið) og somuleiðis at gera seg inn á NATOsamgonguna, er og verður imperialistiskur leigusveinur.

Harra e skrivar so stuttliga um NATO evangelíið.

Eitt lítið søguligt yvirlit. Sum harra e óivað veit, gjørdu Sovjetimperialistarnir og nazistarnir tann 23. august í 1939 ein loyniligan sáttmála, har teir býttu Eystureuropa ímillum sín. Sovjetimperialistarnir skuldu hava eysturkarelin frá Finlandi, sum teir hava enn, somuleiðis skuldu teir hava Estland, Letland og Lithauen, hvar eru tey í dag? Eisini kravdu teir eystara helvt av Póllandi, sum teir framvegis hava, og at endanum Bessarabia frá Rumeniu; tað er framvegis innlimað í Sovjetimperiið.

Ná, so kom kríggið, Hitler var ikki at lita á. Um sjálvt kríggið er ikki neyðugt at skriva, tað søguna kenna vit øll. Men tá ið kríggið endaði, hvussu sá tá út? Jú, vestanveldini, Amerika, Ongland frigjørdu Frakland, Italiu, Belgia, Holland, Luxemburg, Danmark og Noreg, — og so fóru teir heim, hermenn vórðu sendir vestur um hav aftur.

Men hvussu var eystanfyri? Jú Reyði herurin hersetti Bulgaria, Rumenia, Ungarn, Pólland og Tjekkoslovakia (í hesum førinum síggja vit burt frá figgindanum Nazitýsklandi), men hvat hendi so, fóru teir heimaftur, nei als ikki, við und antak av Tjekkoslovakia, blivu teir standandi, teir standa har tann dag í dag og nú eisini í Tjekkoslovakia.

Sum vit hava sæð fekk fasistastýrið í Kreml væl burtur úr sáttmálanum við Hitler, teir fingu alt tað sum Hitler skuldi hava eisini.

Menn við ábyrgd sóu nú, at her varð galið, tí varð NATO stovnað harra e. NATO varð stovnað sum verjusamgonga, ímóti Sovjetimperialistunum.

NATO stendur tí sum einasti garantur, fyri at vit kunnu liva okkara lív sum frælsir borgarar, við relativt høgum livifóti, í ein um demokratiskum samfelagi, mótvegis at sum statstrælir at tæna einum fasistiskum minniluta, sum jú tey valdandi 5 pst. ný-yvirstætta fólkini í Sovjet í veruleikanum eru.

Aftur til imperialistiskar leigusveinar; teir kunnu býtast sundur í fýra bólkar:

1. Gangstarar, sum t. d. allir landshøvdingar í hjálondum sovjetimperialista.
2. Allir Boulevardfasistar, ið við ófriði og rumbli hótta tað demokratiska samfelagi
3. Professionellir revolutionerir, eitt nú Che Guevara.
4. Allir pasifistar í ti hóttaða Vestureuropa.

Um triðja heimin er at siga, at frælsi heimurin (við frælsi meini eg rættin til sjálvur at velja) letur 97 pst. av allari hjálp ið latin verður, av tí Ame rika bróðurpartin, harra e nýtist ikki at vera stórur roknimeistari, fyri at finna útav, hvussu nógv verður latið av Sovjet og tess hjálondum.

Hevði tað ikki verið betur, um nú Sovjetimperialistar, ístaðin fyri at dýkja smáar menn við Napoleonskomplekssum, eitt nú Nasser undir í vápn um, lótu eins nógv í uttanlandahjálp og frælsi heimurin, ja so var longu nógv vunnið framá, men vit hava ein lítlan illgruna um, at viljin er ikki til staðar, jú betur eitt land er fyri, jú verri er tað at leggja undir seg.

sr.

NB. Í ár eru 30 ár síðani Hitler legði Tjekkoslovakia inn undir sítt vald, friður verið við minni tess.







RESTORFFS PILSNARØL



sjálvandi



Keypið
frá teimum, sum lýsa í
SOSIALINUM

FÆRØSK MARGARINE
Vita No 1
VITAMINISERET
FÆRØSKT PRODUKT FINT PRODUKT

junum, ið har vóru, og flyta tær heim til Rusland sum eitt lið í krígsendurgjaldinum.

Støðan hjá teimum fýra hersetingarlondunum var í stuttum henda um ársskiftið 1945-47: Bretland ynskti at demontera tað úr Ruhr, sum tað helt seg hava rætt til í endurgjaldi. Eisini ætlaði breteska labourstjórnin at sosialisera tað, sum eftir var í Ruhr, t. v. s. virkir sum t. d. Krupp, I.G.Farben, AEG, Bochumer Verein, Telefunken og øll hini heimskendu iðnaðarimperiini, somuleiðis týsku stór bankarnar, tryggingarfeløgini o. s. fr. Men hetta varð av ongum; bretska labourstjórnin fekk tvinnar kostir í at velja annaðhvørt at sleppa øllum sosialistiskum eksperimentum í Ruhr ella at verða dollarhjálpina úr Amerika fyri uttan. Var tað nakað sum Bretland tørvaði tá so var tað pengar, so har var bara eitt at gera hjá Bretlandi: at dansa eftir floytuni úr Washington.

Stalin hevði fyrst og fremst til endamáls at fáa so nógv krígsendurgjald sum møguligt úr Týsklandi. Hann visti at í eysturzonanum búði bar aein triðingur av týska fólkinum, men harafturímóti vóru landbúnaðarøkir har sum kundu breyðføða bæði eystur- og vesturtýskarar. Tá menninir í Kreml sóu, at ognarrætturin yvir Ruhr var gloppin teimum av hondum, so var onki annað at gera, enn at fara og býta — breyð fyri maskinanlegg, maskinanlegg fyri breyð, uttan maskinur vestanífrá ongin matur eystanífrá, uttan varur eystanífrá ongar maskinur vestanífrá! Henda skipanin helt áfram til mai mánað 1946

Amerika var vegna sína peningaliga og hernaðarligu sterku støðu blivin tann dominearandi maktin í vestligu hersetingarzonunum. Truman forseti og hansara politisku og búskaparligu ráðgevarar vóru komin til tað úrslit, aftaná at hava kannað viðurskiftini í Vestureuropa sum heild, at vánaliga støðan, serliga hin búskaparliga, hjá hesum londum gjørdi tað avgjørt neyðugt at fáa ríku vestligu hersetingarøkinǐ við í eina samskipaða endurreising av øllum Vestureuropa. Búskaparliga skuldi hesin planur fáa vesturevropeisku londini á fótur aftur, og politiskt verða verjin móti kommunistisku hóttanini eystaneftir, hildu amerikumenn Eftir at samarbeiði versnaði millum teir sameindu veturin 1945-46, ásannaðu amerikanskir embætismenn í Týsklandi longu nú, at einasta, ið var at gera, fyri at sleppa burtur úr naggatódnini í Týsklandspolinum, var, at gera eina statsliga sundurbýting av tí hersetta Týsklandi í eitt Vestur- og eitt Eysturtýskland; enn varð ikki tosað alment um hesa ætlan, sum gekk beint ímóti avtaluni úr Postdam.

Frankaríki hevði nú fingið sín sess í kontrolráðnum í Berlin. Hóast de Gaulle ikki var



de Gaulle

boðin við á Yalta- og Postdamfundin so royndi hann nú alt hann kundi at gera Frankaríkis ávirkan galdandi í komandi Týklandspólitikkinum. Hann hevði góðtikið avgerðina um eina langfreistaða herseting av Týsklandi, men hevði ikki fingið ynski sítt uppfylt um at býta Týskland sundur í mest møguligar smástatir. Av somu orsøk vildi gen[illegible]furin í Paris ikki hoyra [illegible]erikansku ætlanina at samanleggja teir vestligu hersetingarzonarnar til eina statsliga felagseind, de Gaulle kravdi m. a., at Saarøkið skuldi innlimast í Frankaríki og fekk vilja sín (seinri er Saar komið heim til Týskland aftaná fólkaatkvøðuna í 1956 um statsrættarligu støðuna) hann kravdi somuleiðis at Rhínlandið skuldi hava eina búskaparliga samgongu við Frankaríki, Ruhr skuldi internationaliserast o. s. fr. »Alt fyri«, sum de Gaulle einaferð tók til í eini røðu »at forða Týsklandi í at venda aftur til sínar óndu tankar.«

Sum fráleið blivu amerikansku ætlanirnar um sundurbýti av Týsklandi meira almennar. USA og Stóra-Bretland vóru longu í ferð við at fyrireika samanleggingina av teirra hersetingarzonum, bizonin sum hann seinri bleiv kallaður. Tað var eisini um hetta mundið í mars 1946, at W. Churchill helt sína víðagitnu røðu í Fulton í USA, har hann m.a. segði, at »eitt jarntjald var søkt niður yvir europeiska meginlandið frá Stettin við Eystrasalt til Triest við Adriatiska havið,« og mælti til, at USA, Bretand og Vesturevropa gingu saman um verjuna av Vestureuropa, sum stóð yvir fyri eini støðugari kommunistiskari hóttan.

Tann 5. sep[illegible]ber 1946 varð avtalan millum amerikanska og bretsku stjórnina um stovnanina av bizonanum ein veruleiki. Og 6. september helt amerikanski uttanrikisráðharrin Byrnes eina talu í Stuttgart, har hann greiddi frá tí ið gjørt var. Tað er neyðugt, segði hann, at »geva týska fólkinum í øllum Týsklandi ábyrgdina fyri tess lív og lagnu í framtíðini. Fyrsta stigið var ein demokratisk týsk stjórn harnæst ein friðarsáttmáli við hesa somu stjórn.« Byrnes tosaði um »alt Týskland«, men tað varð sagt, at royndin skuldi byrja í amerikanska og bretska vesturzonanum. Frankaríki segði nei til nakra samanleggíng, sambært sín sundurlimingarpolitikk av Týsklandi, men varð seinri tvungið til at broyta støðu tvey ár seinri, tá heimsviðurskiftini vóru blivin eini heilt onnur. Og úr Moskva væntaðu menn als onga játtan um samanlegging við vestaru zonarnar.

(Framhald)